Eivind Jacobsen keypir matvøruhandlar

Borgarstjórin á Strondum, Eivind Jacobsen, hevur yvirtikið báðar matvøruhandlarnar á Strondum. Frá mánadegnum verður bara ein handil í bygdini. Endamálið er at bjóða strandingum kappingarførar prísir á gerandisvørum

HANDIL
Stefan í Skorini

Eivind Jacobsen hevur keypt báðar handlarnar á Strondum, og framyvir verður bara ein handil í bygdini. Hann hevur nýtt millum 5 og 6 milliónir krónur fyri bygningar, inventar og vørugoymslur

Framyvir fara strandingar bara at hava ein matvøruhandil í bygdini. Handilin Stranda Centrum verður niðurlagdur og hildið verður fram í handlinum hjá Kára Hansen, sum fer at eita Stranda Centrum. Tað er Eivind Jacobsen, sum yvirtikið báðar handlarnar í bygdini, og annar fer at lata aftur.

– Eg sendi ein fyrispurning til eigararnar av handlunum, um teir vóru til sølu. Eg vildi tryggja mær at fáa báðar handlarnar, tí annars hevði eg ikki farið undir hetta, sigur Eivind Jacobsen.

Handlarnir vóru til sølu fyri tann rætta prísin, og tilsamans hevur Eivind Jacobsen nýtt millum 5 og 6 milliónir krónur fyri bygningar, inventar og goymslur.

Skal vera kappingarførur

– Endamálið við at keypa báðar handlarnar er at veita strandingum eina betri tænastu. Vit ætla okkum at kappast við teir stórru handlarnar hinumegin fjørðin, so at fólk á Strondum kunnu keypa gerandisvørur fyri somu prísir sum aðrastaðni, sigur Eivind.

Eivind vísir á, rakstrartølini fyri hinar báðar handlarnar vístu, at tað so dánt mól runt. Hann væntar, at við at hava ein handil ístaðinfyri tveir, skuldi verið møguligt at fingið ein betri rakstur enn frammanundan.

Ein av fyrimununum við at hava ein størri handil er, at hesin fær betri innkeypsprís frá heilsølunum.

Borgarstjórin á Strondum sigur, at endamálið við handlinum er, at strandingar kunnu keypa gerandisvørur fyri somu prísir sum aðrir eysturoyingar

Hetta gevur betri møguleikar at veita kundunum tilboð. Eivind sigur, at fyrr var vanligt, at strandingar fóru aðrastaðni at keypa, men hetta rákið er minkað seinastu tíðina.

Nýggi samanlagdi handilin fer at halda til í bygninginum hjá Kára Hansen, tí hann er betri egnaður enn tann gamli Stranda Centrum. Ein orsøk er, at hesin hevur tveir kassar. Hesin handilin er umleið 180 fermetrar til víddar.

Talan verður neyvan um at siga nakran úr starvi. Eivind sigur, at nøkur av starvsfólkunum fara at gevast, og hann væntar, at tey fara at hava nakrar tímar til øll starvsfólkini.

Eivind hevur tó ætlanir um at víðka virksemið hjá hesum handlinum til at fevna um at kalla øll vørusløg, sum vit kenna úr handlum sum Bilka í Danmark, men hetta liggur langt frammi í tíðini.

Eivind Jacobsen er frammanundan nevndarformaður og partaeigari í Stranda Máling, og hann er í hálvum starvi sum borgarstjóri í bygdini.

Gøtustevna um vikuskiftið

Eitt av áhugaverdu tiltøkunum á Gøtustevnu verður á sandinum í Syðrugøtu fríggjakvøldið, tá skipað verður fyri stórari konsert. Clickhaze, M.C. Hár, Enekk og Hanus G. Johansen eru millum áhugaverdu nøvnini

Árliga Gøtustevnan verður komandi vikuskifti við eini rød av áhugaverdum tiltøkum, sum hoyra eini slíkari summarstevnu til

TÍÐINDASKRIV

Eitt av afturvendandi og sera vælumtøktu tiltøkunum er skemt á kajøkinum á Norðragøtu. Har skulu virkir í Gøtu og har um leiðir rógva kapp í gummibátum. Talan verður um eina stafettkapping har hvørt virki hevur tríggjar luttakarar. Vinnandi virkið fær steyp til ognar.

Stevnan byrjar annars longu fríggjakvøldið við konsert á sandinum í Syðrugøtu. Leygardagin verður stevnan sett í sambandi við at meistaraliðini hjá B68 frá 1992 og GÍ frá 1993 skulu leika. Leygarkvøldið verður sum vanligt bál, felagssangur og miðnáttarrøða á Oyrini í Norðragøtu, har Edmund Joensen, tingformaður, fer at flyta fram røðu. Seinni leygarkvøldið verður dansur í ítróttarhøllini á Kambsdali, har Frændur spæla. Stevnan heldur fram sunnudagin við ítrótti og øðrum undirhaldi.

Vanliga leita nógva fólk sær til Gøtu hesar dagarnar. Talan er í stóran mun um skurðar sum búgva aðrastaðni, sum venda aftur á kendar leiðir.

Verjumálaráðharrin í Føroyum

Nýggi danski verjumálaráðharrin Svend Aage Jensby vitjar í Føroyum

VITJAN
Stefan í Skorini

Ráðharrin hevði mikudagin fundir við bæði Ríkisumboðsmannin, Birgit Kleis og við løgmann, Anfinn Kallsberg. Seinni mikukvøldið var skipað fyri almennum døgverða á Hotel Føroyum við almennum umboðum.

Hann vitjar tó fyrst og fremst Færøernes Kommando í Føroyum. Verjumálaráðharrin lendi við flogfarinum hjá Atlantic Airways klokkan tíggju minuttir yvir tíggju mikumorgunin, og hann fór beina leið á støðina í Mjørkadali.

Hann fer avstað aftur í dag, hósdagin, við flogfari, men áðrenn fer hann á stutta vitjan í Kirkjubø.

Hetta er fyrstu ferð, at Svend Aage Jensby vitjar í Føroyum sum verjumálaráðharri.

Plásstrot í skúlanum við Ósánna

Tað er sera trongligt hjá bæði lærarum og næmingum í skúlanum við Ósánna í Klaksvík. Skúlin hevur ongar serstovur sjálvur og fyrsti og annar flokkur mugu deila stovu og hava sostatt onga heimastovu

SKÚLI
Solby A. Eliasen

Trongligt er við plássi í skúlanum við Ósánna. Einasta loysnin er útbygging, heldur skúlastjórin, Símun Petur Hjelm

Klaksvík:
Símun Petur Hjelm, skúlastjóri sigur, at tað er ein akuttur trupulleiki, sum hann vónar verður loystur sum skjótast.

- Tað er sera óarbeiðsligt á skúlanum, tí tað er so trongligt. Tað er næstan ikki ein dagur, uttan tað man hoyrir onkran siga, at ikki ber til at gera eitt ella annað, tí tað er so lítið pláss, greiðir Símun Petur frá.

Tað er serliga tørvur á stovum, sum talan er um. Skúlin við Ósánna hevur ongar serstovur, tað vil siga, evning, handarbeið, smíðstovu ella køk. Men køkur og smíðstova eru í skúlanum á Ziskatrøð og fara næmingarnir í skúlanum við Ósánna niðan um, tá tey hava køk ella smíð. Evning og handarbeiði hava tey inni á teim vanligu stovunum, og tað riggar ikki so væl, heldur Símun Petur Hjelm, tí millum annað er onki stað at goyma tað, sum tey hava gjørt í. Eisini er alt ov lítið goymslurúm til alt tilfarið, sum lærugreinar sum handarbeiði og evning krevja.

Ein lítil teldustova er á skúlanum, sum verður nýtt av næmingunum, men aloftast verður eisini farið niðan í hin skúlan til tað. Skúlarnir báðir hava eisini felags fimleikarhøll.

Onga heimastovu

Fyrstu og annar flokkarnir í skúlanum við Ósánna deilast um teirra stovur. Hetta hevur fyri tað fyrsta við sær, at fyrsti flokkur ikki kemur í skúla fyrr enn klokkan tólv. Eisini hevur tað við sær, at børnini fáa ikki sett teirra egna sermerki á stovuna í sama mun, sum tey, sum hava egna stovu. Tí tey noyðast at hugsa um, at tað eru onnur børn, sum eisini nýta stovuna, tá tey sjálvi eru heima.

Símun Petur Hjelm dugir ikki at siga, um tað at fyrsti flokkur gongur í skúla seinnapartar í sær sjálvum er nakar trupulleiki, men hann heldur tað vera harmiligt, at tey ikki kunnu vera í skúla samstundis, sum øll hini eru har. Og at tey ikki hava eina heimastovu tvey tey fyrstu árini, tey eru í skúla.

Men tað eru ikki bert børnini í fyrsta og øðrum flokki, sum merkja hendan trupulleikan. Næmingarnir í tíggjunda flokki ganga ikki í skúla í sama bygningi sum hini. Fyri tveimum árum síðani, varð bygningurin við síðuna av skúlanum, tað sum er kent sum Advokathúsið, keypt til at hýsa tíggjunda flokkunum.

Har eru tvær skúlastovur inni. Ein í miðhæddini og ein í kjallaranum.

- Men Advokathúsið er eitt sethús og ikki ein skúlabygningur, so talan er bert um eina fyribilsloysn, sigur Símun Petur Hjelm.

Áðrenn Advokathúsið bleiv keypt, gingu tíggjunda flokkarnir í Ósáskúlanum í skúla í Skótahúsinum hjá teimum gulu skótunum, Uppistovu. Men tá vóru næmingarnir longri burtur frá skúlanum, men nú teir eru í Advokathúsinum eru teir beint við síðuna av skúlanum.

Ein annar trupulleiki sum eisini stendst av plásstrotinum er, at tað letur seg ikki gera at býta flokkar, sum eru við at gerast ov stórir, sundur. Tí ongin stova er til taks.

- Her er simpulten ongin stova, tí allar eru í brúk, sigur Símun Petur Hjelm.

Tann størsti flokkurin, sum er á Ósáskúlanum í løtuni telur 28 børn. Og eru hetta børn, sum fara í áttanda flokk komandi skúlaár.

Bæði lærarar og næmingar filast á, at tað er so trongt í skúlanum. Og Símun Petur sigur, at hann er ovfarin av at trivnaðurin á skúlanum ikki er versnaður meira av trongu arbeiðsumstøðunum.

- Lærararnir gera ein veldigan innsats hvønn dag fyri at fáa so nógv sum yvirhøvur gjørligt at bera til. Men tað er næstan ikki ein dagur, uttan at onkur sigur, at um tað hevði verið rúmligari, so hevði man kunnað gjørt hetta ella hatta. So tað er ørkymlandi, sigur skúlastjórin.

Útbygging einasta loysn

Skúlastjórin í Ósáskúlanum er ikki í iva um, at einasta loysnin upp á hesar trupulleikar er at tað verður bygt út. Men hann leggur dent á, at ein møgulig útbygging má tilrættisleggjast neyvt, tí hann vil ikki hava, at skúlin kemur at standa undir útbygging í fleiri ár.

- Ósáskúlin má ikki koma at síggja út sum eitt byggipláss í eini fimm til tíggju ár, sigur Símun Petur Hjelm.

Skitsur finnast av eini møguligari útbygging. Her er talan um at byggja skúlan út norðureftir móti Advokathúsinum. Men talan er sum sagt enn bert um skitsur.

Símun Petur Hjelm letur væl at samstarvinum sum skúlin hevur havt við býráðið ta seinastu tíðina um henda trupulleika.

- Býráðið hevur verið serstakliga positivt yvir fyri hesum málinum og tað frøðir meg at síggja at skúlarnir tykjast at verða raðfestir munandi hægri nú enn undanfarin ár, sigur hann.

- Eg veit, at býráðið eisini hevur nógv annað átroðkandi at taka sær av, men eg vóni, at tey nú fara at duga at síggja, hvussu neyðugt tað er at byggja Ósáskúlan út. Tí um ein býur sum Klaksvík skal mennast, so mugu vit hava skúlar, sum kunnu bjóða bæði børnunum og foreldrunum nakað, heldur Símun Petur Hjelm, skúlastjóri við skúlan við Ósánna í Klaksvík.

Skúlin viðlíkahildin

Í hesi summarfrítíðini verður skúlin tó fríðkaður bæði uttan og innan. Hann er málaður uttan nú. Og innan verður alt gólvið í auluni skift. Veggirnir verða allir málaðir innan, tó ikki í stovunum, tí tær eru gjørdar fyri ikki so langari tíð síðani. Eisini eru vindeyguni í skúlanum skift fyri stuttum.

- Bygningurin sjálvur er ikki í ringum standi, men um hann ikki verður hildin við líka, so er tað so skjótt, at tað byrjar, sigur Símun Petur Hjelm at enda.

Málið er at fáa pening til fyrsta byggistig í ár

Jórun Høgnesen, formaður í Mentanarnevnd Klaksvíkar býráðs, sigur, at útbyggingin av Ósáskúlanum verður ikki projekterað fyrr enn pengarnir til fyrsta byggistig eru játtaðir.
- Og tað er málið hjá mær at fáa teir pengarnar á fíggjarlógina komandi ár, sigur hon

SKÚLI
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
- Vit miðja eftir at fáa tríggjar millióndir játtaðar til fyrsta byggistig. Tað skuldi verið nóg mikið, sigur Jórun uttan at koma nærri inn á, hvat fyrsta byggistig inniber.

Hon heldur, at allir flokkar eiga at hava egna stovu. Tíðin leggur upp til tað í dag.

Hetta málið er ikki nakað nýtt mál. Tað hevur verið tosað um plásstrotið á Ósáskúlanum í fleiri ár. Tað veit Jórun Høgnesen eisini av. Hon er lærari við skúlan og kennir sostatt trupulleikan bæði innanífrá og uttanífrá. Tað metir hon vera ein fyrimun. Serliga tí hon hevur stríðst fyri hesum í fleiri ár. Eisini langt áðrenn hon kom upp í politikk.

- So nú síggi eg tað sum eina styrki at kenna trupulleikan so væl upp á egnan kropp. Tí tað nýtist ikki nøkrum at koma og siga mær, hvussu trupult tað er at arbeiða ella hvussu støðan er við ymiskum. Eg merki tað jú sjálv hvønn dag, sigur Jórun Høgnesen. Hon harmast eisini samstundis um, at onki verður gjørt við skúlan á Ziskatrøð í ár vegna tørv á handverkarar.

- Hatta dámar mær lítið. Tí mín uppgáva var at skaffa pengarnar, og nú teir eru har, nú mangla handverkarar. Tað má ikki koma fyri aftur, so eftir summarfrítíðina ætli eg mær at endavenda byggimálinum saman við teimum, sum vara av tí, so tað ikki kemur fyri aftur, at vit standa við ov fáum handverkarum. Hatta er ov illa tilrættislagt, tí man má vita um veturin, hvar handverkararnir verða um summarið, sigur Jórun Høgnesen, og leggur at enda aftur at, at hon væl veit, at man má ikki fara at gera nakað í óðum verki, tí tað loysir onki, men tílíkt má tilrættisleggjast betur í framtíðini, soleiðis at man ikki kemur í somu støðu aftur eina aðru ferð.

Jórun Høgnesen, formaður í Mentanarnevndini í Klaksvíkar Býráð, sigur, at hennar mál er at fáa pening til fyrsta byggistig til útbygging av skúlanum við Ósánna játtaðan á komandi fíggjarlóg